


*Føroyingar sleppa næsta árið at dystast við Italia og Frakland, har fleiri av kendastu og bestu fótbóltsspælarunum í heiminum spæla*

# Heimsins bestu koma til Føroya

**Tað verða nógvar heimsstjørnur at halda skil á hjá føroyska fótbóltslandsliðnum í næstu EM-undankappingini – Andrei Schevchenko, Thierry Henry, Alessandro Del Piero og Francesco Totti kom allir til Føroya at spæla næsta árið**

EM-LUTAKAST
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Lutakastið hjá føroyska fótbóltslandsliðnum til næstu EM-undankappingina var á góðari leið.

Tá ið lutakastið var komið í helvt sá einki út, tí tá vóru londini Georgia, Litava og Ukraina komin úr pottinum, men í einum blandi við Skotland, Italia og Frakland gjørdist lutakastið heilt gott.

Tað kundi saktans enda nógv verri, um Føroya til dømis komu í marrubólk A, ella drógu Grikkaland og Turkaland sum tey sterkastu londini.

Tvey bæði londini, sum Føroyar fingu úr teimum sterkastu bólkunum, eru sera áhugaverda ítróttarliga og fíggjarliga. Áskoðararnir vilja gjarna síggja Frakland og Italia spæla í Føroyum, og landsliðsspælararnir sleppa at royna seg ímóti teimum bestu.

### Mugu eystureftir

Føroyska landsliðið sleppur tó ikki undan ferðum eystureftir, og tað kann verða sera trupult at ferðast til bæði Ukraina og Georgia, har mótstøðan eisini verður sera hørð. Føroysk feløg hava ikki góðar royndir at ferðast so langt at spæla fótbólt, og landsliðið fær tvær sera truplar uppgávur har.

Hini bæði londini í okkara bólki liggja undir miðal og yvir miðal. Litava er ikki so langt burtur sum Georgia og Ukraina, men heldur ikki so áhugavert sum Skotland, har føroyingar aftur sleppa at royna seg í hesi undankappingini.

### Heimsstjørnur til Føroya

Føroyska landsliðið sleppur í næstu EM-kappingini at spæla seg ímóti nøkrum av størstu stjørnunum í aljtóða fótbólti nú á døgum.

Nakrir av heimsins allarbestu álopsspælarum koma til Føroya, tí Andrei Schevchnko er stóra stjørnan á ukrainska landsliðnum, og á franska landsliðnum er Thierry Henry skarprættari.

Harafturat kemur Italia við álopsinnaðum spælarum sum Alessandro Del Piero og Francesco Totti.

Aðrir fótbóltsspælarar, sum føroyingar sleppa at uppliva í Føroyum, eru Patrick Viera (Juventus), Darren Fletcher (Manchester United), Alessandro Nesta (AC Milan), Andrea Pirlo (AC Milan), Gianluigi Buffon (Juventus) og David Trezeguet (Juventus bara fyri at nevna nakrar.

Dystirnir í næstu EM-undankappingini verða spældir frá komandi heyst og eitt ár fram.

# EM 2008

**Lutakastið til næstu EM-undankappingina var í Sveis fríggjdagin. Úrslitið gjørdist hetta.**

**Bólkur A**
Portugal
Pólland
Serbia-Montenegro
Belgia
Finnland
Armenia
Aserbadjan
Kasakhastan

**Bólkur B**
Frakland
Italia
Ukraina
Skotland
Litava
Georgia
FØROYAR

**Bólkur C**
Grikkaland
Turkaland
Noreg
Bosnia-Herzogovina
Ungarn
Moldova
Malta

**Bólkur D**
Kekkia
Týskland
Slovakia
Írland
Wales
Kypros
San Marino

**Bólkur E**
England
Kroatia
Russland
Ísrael
Estland
FYR Makodonia
Andorra

**Bólkur F**
Svøríki
Spania
Danmark
Letland
Ísland
Norðurírland
Liktinstein

**Bólkur G**
Holland
Rumenia
Bulgaria
Slovenia
Albania
Hvítarussland
Luksemborg

# Óli fegnast um lutakastið

**– Lutakastið var heilt gott, og serliga tey sterkastu londini í okkara bólki eru sera áhugaverd, sigur liðformaðurin á landsliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Óli Johannesen telist millum teir royndastu spælararnar á fótbóltslandsliðnum, og hann ætlar sær at verða við í næstu undankapping, har nýggjar og spennandi avbjóðingar eru fyri framman.

– Tað ber altíð til at ynskja sær eitt betri lutakast, men tað kundi eisini spælt nógv verri av. Tað verður strævið at fara til Georgia og Ukraina at spæla, men dystirnir ímóti Fraklandi og Italia eru sera spennandi uppgávur, sigur Óli Johannesen.

– Eg hevði sum nógv onnur ynskt mær at fingið Ongland í okkara bólk, men Frakland og Italia er eisini sera gott. Vit hava ongantíð roynt okkum ímóti Italia áður, og tað er altíð spennandi at spæla ímóti eini tjóð sum Fraklandi, sum telist millum tær sterkastu í heiminum.

### Vil hava stig

Ein annar spurningur er, hvussu vónirnar eru hjá føroyska landsliðnum at fáa nakað stig burtur úr næstu undankappingini.

– Vit skulu hava okkurt stig, men eg tori ikki at siga, hvussu nógv og ímóti hvørjum vit skulu fáa tey, sigur Óli Johannesen.

– Hava vit ein góðan dag, so ivist eg ikki í, at vit kunnu fáa okkurt burtur úr onkrum dysti í hesum bólkinum. Vit skulu so í øllum førum ikki enda á null, sigur hann.